gult cyan magenta svart















gult cyan magenta svart



# Stórt stríð at fáa avloysaraskip

**Vandi er fyri, at einki avloysaraskip kemur til Lorvíksfjarðaleiðina, tí tað dregur út við teimum formligu viðurskiftunum, sum eru umfatandi og drúgv at fáa í rættlag**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Enn eru øll viðurskifti viðvíkjandi avloysaraskipinum til Lorvíksfjarðaleiðina ikki komin uppá pláss, og vandi er fyri, at einki avloysaraskip kemur til landið.

– Tað er ómetaliga tungt at leiga eitt skip, tí øll krøv skulu verða uppfylt, áðrenn skipið kann leigast. Myndugleikar skulu góðkenna skipið, broytingar skulu gerast og alt tekur tíð. Eingin tekur nakran kjans, tá talan er um eitt ferðamannaskip, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni.

– Vandi er framvegis fyri, at alt dregur so nógv út, at tað loysir seg ikki hjá okkum at leiga skipið, sigur hann.


*– Strandfaraskipini eru so gomul og slitin, at vandin er allatíðina fyri, at skipini kunnu fáa teknisk brek. Tað er ein dagligur línudansur, at fáa samferðsluna at bera til, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni*

### Óheppin støða

Trupulleikarnir í samferðsluni millum oyggjarnar stava frá, at Dúgvan hevur motorskaða og ikki kann fara í sigling aftur fyrstu tvær ella tríggjar vikurnar.

Hesa tíðina røkir Ternan farleiðina millum Klaksvík og Lorvík, men Ternan er ikki nóg stór, og samstundis verður leiðin um Vestmannasund rakt av hesum. Tí verður roynt at fáa avloysaraskip.

– Støðan er sera óheppin, og eg kann sum strandferðslustjóri bara banka undir borðið og vóna, at einki hendur við Sam. Fær Sam nakað brek, so standa vit mitt í tí, sigur Reidar Nónfjall.

– Strandfaraskipini eru so gomul og slitin, at vandin er allatíðina fyri, at skipini kunnu fáa teknisk brek. Tað er ein dagligur línudansur, at fáa samferðsluna at bera til, og tað er allatíðina møguleiki fyri, at vit koma í somu støðu aftur.

### Tilvildarligt

Strandferðslustjórin sigur, at tað er reint hepni, at eitt avloysaraskip yvirhøvur er til at fáa fatur í.

– Tað er púra tilvildarligt, at tað ber til at fáa hendur á eini avloysaraferju. Hevði tað verið meiri ferðsla hesa ársins tíð í Estlandi, so stóðu vit á púra á berum við ongum avloysaraskipi, sigur hann.

– Men hóast tað ber til at fáa eitt skip, so er tað eitt baks at fáa alt uppá pláss, og vandi er fyri, at tað ikki eydnast. Tað hevði verið ein heilt onnur støða, um vit høvdu eitt avloysaraskip í landinum, og um skipini annars vóru nýggjari, sigur Strandferðslustjórin.

Pengarnir til avloysaraskipið um Lorvíksfjørð eru tøkir, men spurningurin er framvegis, um teir verða nýttir til endamálið.

Tað fara komandi dagarnir at vísa.


*Hervør og Joan Joensen reka ítróttarhandilin Innkast*

# Tær eiga innkastið

**Nýggjur frítíðar- og ítróttarhandil er latin upp í Klaksvík**

HANDIL
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Leygardagin lat nýggjur frítíðar- og ítróttarhandil upp í Klaksvík. Tað eru systrarnar Hervør og Joan Joensen, sum reka handilin.

Handilin eitur Innkast, og tað mann geva teimum flestu ábending um, hvat slag av handli, talan er um.

Innkast fer at selja ítróttarklæði av alskyns slagi, skógvar og frítíðarklæði bæði til børn og vaksin.

Nýggi ítróttarhandilin liggur við Klaksvíksvegin, har nógvir handlar eru.




# Frumsýna fríggjadagin

**Klaksvíkar Sjónleikarfelag fer at frumsýna leikin Afturgongur fríggjakvøldið í Atlantis**

SJÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Nú verður nýggi leikurin hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag frumsýndur.

Fríggjakvøldið klokkan 20.00 verður leikurin Afturgongur, sum Henrik Ibsen skrivaði í 1881, spældur av fyrstan sinni í Klaksvík.

Teir fimm leikararnir hava seinastu dagar arbeitt miðvíst saman við leikstjóranum og øðrum hjálparfólki fyri at fáa leikin undir land, og tað hevur eydnast.

Ætlanin var upprunaliga, at leikurin skuldi sýnast fyrstu ferð í mars, men skifti av leikstjóra seinkaði leikinum.


*Afturgongur verður frumsýndur í Atlantis fríggjakvøldið*

### Harmleikur

Leikararnir í Afturgongur eru Adelborg Linklett, Bjarni Ziska Dahl, Súni Svabo Samuelsen, Jógvan Brim Joensen og Eyð Matras.

Edvard Fuglø hevur gjørt pallmyndina, og Caroline Zantonique og Laura Joensen hava staðið fyri leikstjórnini av leikinum.

Leikurin, sum fer fram á einum harragarði í Vesturnoregi, er ein av kendastu leikunum hjá Henrik Ibsen, og talan er um ein klassiskan leik innan leiklistina. Leikurin verður róptur ein familjuharmleikur.

